# Dropin

## Tók at losna regnið

**Orð: Karsten Hoydal**

**Lag: Annika Hoydal**
Lagt til rættis: Kári Bæk






1 Tók at losna regnið summarlýtt,
brast á enni mínum fyrsti dropi,
tá var hjartað døgg og eygað ljós,
hugur livandi sum kvæmur stropi.

2 Lítið rúmdartekin reint og blankt,
loyst eitt bil úr vatnsins veldishondum,
kom av leið ígjøgnum hav og loft,
birti dag og lív á mínum strondum.

3 Fon á ferð í mold eitt stokkut bragd
funnust vit, og alt var ljóst og eldað,
geislaði mín sál sum tinna í sól,
innan í mær sungu hav og kelda.

Karsten Hoydal (1912-1990).
H: "Dropin". Pr: "Vatnið og ljósið"
(yrkingasavn) 1960.

Uppskot til framførslu:
1. ør: SA
2. ør SAT
3. ør SATB
ella
1.ør SB
2. ør SAB el. STB
3. ør: SATB
Solo rødd kann syngja eitt ør. meðan
hini syngja con bocca chiusa.
Áttindapartar á sama tóna verða
tá slignir saman til langar tínar.